Tit ringja — vit skriva
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 11820 - Telefax 14720

tíðindablaðið sosialurin

Lýsingar
Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 11820 - Telefax 14720

veðrið

Brúgvaløgini í samband við lágtrýstið, sum av leiðunum norðanfyri Ísland spakuliga er ávegis eystureftir, fara yvir Føroyum. Eitt lágtrýstøki, sum hevur kaldari luft og æling við sær, rekur sunnaneftir yvir Føroyar leygardagin. Ein veikur hátrýstryggur fer yvir Føroyum mánadagin og síðan nærkast aftur brúgvaløg vestaneftir.

Fríggjadagin:



Lot upp í fríska lot, 5–10 m/s, av landssynningi og eystri, ádrigið, væl av regni og bert toluligt sýni. Hitin millum 9 og 13 stig.

Leygardagin og sunnudagin:
Sum liður á leygardagin, 5–10 m/s, av útnyrðingi, men seinni, kanska út á sunnudagin, lækkandi niður í vestan ella útsynning. Tað verður mestsum ádrigið, regn í skiftum ella ælingur, annars toluligt sýni, tó eisini sólarglottar og gott sýni upp ímillum, einamest sunnudagin. Hitin millum 8 og 11 stig.

Mánadagin og týsdagin:
At byrja við bert lot, 5 m/s, av útsynningi, seinni lot upp í fríska lot, 5–10 m/s, av landssynningi, skiftandi skýferð og sýni, helst turt, men kanska mjørki í støðum, Hitin millum 8 og 12 stig.

Nú verða tríggjar rutur til Skotlands um vikuna:

Skipafelagið bjóðar Strandferðsluni av – ella kanska øvugt

Samstundis sum Strandferðslan boðar frá, at »Smyril« nú skal sigla tvær ferðir um vikuna til Aberdeen, boðar Skipafelagið Føroyar frá, at farmaskipið »Saga« nú siglir til Aberdeen við feskum fiski í staðin fyri Hirtshals

Skjótt hálvannað ár er tað síðani, at Strandferðslan setti sær fyri at satsa upp á farma- og ferðafólkasigling til Skotlands alt árið.

Sambært Tummasi Magnussen, stjóra á Strandferðsluni, hevur hendan sigling bitið seg fasta, og eru bæði fleiri ferðafólk og størri farmanøgdir á hesi rutu nú. Farmurin hevur fyri tað mesta verið feskur fiskur.

Tí kom tað kanska eitt sindur dátt við hjá Strandferðsluni, at Skipafelagið Føroyar skifti havn, so at Saga ikki longur siglir til Hirtshals, men frá hósdegnum 25. august fer at sigla eina ferð um vikuna til Aberdeen, ið Smyril siglir til frammanundan.

Í øllum førum skundaði Strandferðslan sær at økja um siglingina til Skotlands, so Smyril nú siglir tvær ferðir úr Føroyum til Aberdeen, samstundis sum Saga siglir eina ferð. Tað vil siga, at farmur kann fara úr Føroyum til Aberdeen bæði týsdag, hósdag og fríggjadag.

Gott fyri kundarnar

– Fyri kundarnar kann tað bara vera gott, at tríggir møguleikar eru á hesi rutu, og Skipafelagið hevur eisini beinleiðis sagt, at tað ikki er fyri at kappast við okkum, at teir byrja at sigla til Aberdeen í staðin fyri Hirtshals, sigur stjórin á Strandferðsluni, Tummas Magnussen.

– At vit nú eisini seta eina eyka rutu inn til Skotlands, kann bara koma føroysku framleiðarunum til góðar, tí nú kunnu teir leggja arbeiðið á virkjunum betur til rættis, so teirra kappingarføri næstan verður á hædd við tað hjá norðmonnum og dønum, ið kunnu lata feskan fisk til marknaðin alla vikuna.

Kemur illa við

Men meðan Strandferðslan soleiðis ikki tekur tað sum nakra beinleiðis kapping, at Skipafelagið eisini fer at satsa upp á Hirtshals, heldur Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum, at tað kemur eitt sindur illa við hjá Skipafelagnum, at Strandferðslan eisini økir um sína sigling, so tilsamans tríggjar rutur eru um vikuna úr Føroyum til Skotlands.

– At vit hava skift havn frá Hirtshals til Aberdeen, er bert fyri at gera okkara egnu sigling meira rationella, og hetta er bert ein máti at tilpassa seg, so flutningurin kann gerast bíligari, sigur hann.

– Men at Strandferðslan so eisini kemur við einari nýggjari rutu aftrat, so teir tvífalda kapasitetin, kemur heilt klárt illa við hjá okkum. Vit roknaðu ikki við, at vit skuldu fáa meira farm at flyta, tí vit fluttu havn, men ætlan okkara var bara, at so skuldi farmurin verða fluttur eitt sindur bíligari. Hetta er fyri okkara part bert ein rationalisering, men nú sær út til, at kapping verður um rutuna.

Ein av orsøkunum til, at Tummas Magnussen, stjóri á Strandferðsluni, ikki er av teirri áskoðan, at ruturnar koma at kappast við hvørja aðra, er at Strandferðslan fyri tað mesta flytir liðugt framleidda vøru, so sum feskt flak, meðan Skipafelagið heldur flytir feskan fisk, ið ikki er viðgjørdur.

Flyta sama farm

Men hesum er Árni Joensen ikki samdur við honum í:

– Tað er akkurát øvugt. Vit flyta liðugt viðgjørda vøru fyri tað allarmesta, so hetta er alt innan fyri sama øki, sigur hann.

– Vit sigla ikki við trailarum, sum Strandferðslan ger, men munurin er bert hjólini undir konteynarunum, so flutningurin er í roynd og veru akkurát tann sami.

Meðan Skipafelagið ikki roknar við, at nøgdirnar av farmi verða størri, fyri tað um flutt er frá Hirtshals til Aberdeen, so roknar Strandferðslan hinvegin við, at meira farmur verður.

Annar farmur eisini

– Umframt feska fiskin, so vænta vit, at meira farmur av øðrum slagi verður, sigur strandferðslustjórin.

– Millum annað vænta vit, at fleiri smærri innflytarar fara at flyta meira vøru úr Bretlandi til Føroya, enn úr eitt nú Danmark, tí tað er so mikið bíligari.

Nú ruturnar eru tríggjar í tali til Skotlands, verður í framtíðini siglt soleiðis:

Smyril fer av Havnini kl. 17.30 og av Drelnesi kl. 20.30 týsdag og av Havnini kl. 10.30 og av Drelnesi kl. 13.30 fríggjdag, meðan Saga siglir av Havnini kl. 17 og av Tvøroyri kl. 22.00 hósdag.

Meðan Smyril siglir aftur til Føroyar úr Aberdeen, fer Saga viðari til Noregs, har fóður verður tikið umborð, og síðani liggur leiðin aftur til Føroya.

At her er talan um beinleiðis kapping um Skotlands-siglingina, man eingin ivast í. So er bert at bíða og síggja, hvør fer at klára seg betur í hesi kapping, og hvør noyðist at geva seg.

Við allari virðing fyri føroyskum útflutningi, kann ein tó neyvan ímynda sær, hvussu heilar tríggjar rutur til Skotlands skulu kunna bera seg…

hj.

Dupult-brúdleyp

Í dag kl. 16 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík, Jóngerð Mené Midjord, Hvalba og Rúni Olsen, Klaksvík og Marjun Mené Midjord, Hvalba og Sigurð Jacobsen, Klaksvík.
Vælkomst í Skálanum í Klaksvík kl. 21.00.

70 ár

Í dag fyllir Elina Simonsen í Norðradali 70 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum.

Samkoman Sion Vágur

Sunnudag kl. 11.00: Morgunmøti.
Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.
Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.
Mikukvøld kl. 20.00: Bønarfundur.
Bønartænastan svarar á tlf. 73941, frá kl. 20.00–22.00.

Berøa, Saltangará

Opið hús verður í kvøld kl. 21.00. Komandi útisetar og útisetar verða við, við nógvum sangi og vitnisburði. Drekka verður aftaná. Øll kunnu vera við.

Gongutúrur

Felagið Tórshavn skipar leygardagin 20. august fyri gongutúri til viðarlundina í Kerjum og til Vesturvarða. Farið verður frá Hotel Føroyum kl. 15.00.

AA-fundur

verður í Havn í kvøld kl. 20.00 á Vaskarínum, Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri), og klokkan 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu 17

Vestfalskyrrindi

13. august: Mánin næstur jørðini
14. august: Fyrra kvarter
21. august: Fullmáni

Dato	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	Haraldssundi/Leirvíksfirði fp.	sp.	Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp.	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.
19. aug.	0549	1809	0749	2009	0404	1624	0604	1824	0449	1709	0504	1724
20. aug.	0639	1902	0839	2102	0454	1717	0654	1917	0539	1802	0554	1817